# PAM
# Offshore Service
## søkir elektrikarar til arbeiði í Noregi

Av tí at eftirspurningurin eftir dugnaligum elektrikarum til arbeiði í Noregi økist, hava vit brúk fyri fleiri fólki.

Talan er um útbygging av gass-verkætlanini »Snøhvit« ið Statoil letur byggja á oynni Melkøya, uttanfyri Hammerfest í Norðurnoregi. Arbeitt verður tvær vikur og frítíðin er tríggjar vikur.

Um tú lýkur niðanfyri nevndu krøv, vilja vit fegin hoyra frá tær:

- Tú er elektrikari, helst við royndum frá oljuvinnu ella skipi
- Dugur at samskifta á norðurlendskum
- Ert álítandi, ágrýtin og samvitskufullur

Ringið og hoyrið nærri hjá

**P/f PAM Offshore Service**
Gunvør Balle, tlf. 30 11 00

*P/f PAM Offshore Service er dóttirfelag hjá P/f Tórshavnar Skipasmiðju og veitir tænastur til oljuvinnuna. Í løtuni starvast um 20 fólk uttanlands í hesu vinnu.*



**Klaksvíkar Sjúkrahús**
**Deild A**

# Sjúkrarøktarfrøðingar og heilsuatstøðingar

Vegna farloyvi søkja vit eftir sjúkrarøktarfrøðingi at arbeiða 0,7 tíð frá 01.11.04 til 31.08.05 og heilsuatstøðingi/sjúkrahjálpara at arbeiða 0,7 tíð frá 01.11.04 til 31.08.05 ella eftir nærri avtalu.

Arbeitt verður í skiftandi vaktum.

**Førleikakrøv:**
Prógv og góðkenning sum sjúrkarøktarfrøðingur/heilsuatstøðari
Fakligan áhuga og royndir innan kirurgiska økið
Góð samstarvsevnir.

Lønar- og setunartreytir sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og viðkomandi yrkisfelag.

Nærri fæst at vita um størvini frá Annu Løwe Sørensen, deildarsjúkrarøktarfrøðingur deild A, tlf. 455463 lokal 519 ella Jonu Nielsen, fyristøðukvinnu lokal. 106.

Umsókn, saman við prógvi og autorisatión, verður at senda til: Umsjónarmannin, Klaksvíkar Sjúkrahús, FO-700 Klaksvík.

**Umsóknarfreist: Týsdagin 26. oktober 2004.**



**Landssjúkrahúsið**
FO 100 Tórshavn

# Starvsfólk til økispsykiatriina

Søkt verður eftir 2 starvsfólkum til økispsykiatriina. Talan er um tvey fulltíðarstørv, at byrja 1. desember 2004. Hetta eru nýggj størv í samband við, at farið verður undir økispsykiatriskt virksemi.

**Starvið umfatar**
- at skapa eitt frálærutilboð fyri sjúklingar og avvarðandi í teimum ymisku økjunum í landinum
- at arbeiða við psykoedukatión til sjúklingar og avvarðandi innan tær ymisku psykiatrisku diagnosurnar
- førleika og royndir at fremja sjálvstøðugt virksemi umframt at verða við í menning av psykiatriska arbeiðinum á deplinum og úti í økinum
- upplæring av starvsfólkum, sum koma at verða partur av økispsykiatriini
- bólka - og individuella samtaluterapi og frálæru innan økið

**Krøv til umsøkjaran**
- viðkomandi útbúgving
- hollar royndir innan psykiatri
- kunnleika og royndir innan kognitiva terapi
- viðkomandi eftirútbúgving
- áhugi og royndir við frálæru
- førleiki til individuella samtaluterapi
- teldukunnleiki
- nýhugsan og kreativitetur innan trupulleikaloysn
- at arbeiða sjálvstøðugt
- saman við deildarleiðarinum at vera við at samskipa skeið og eftirútbúgving innan tað psykiatriska økið

**Vit kunnu bjóða**
- eitt spennandi arbeiðsumhvørvi við nógvum avbjóðingum
- skeið/eftirútbúgving innanhýsis og uttanhýsis, sum psykiatriski depilin skipar fyri

**Setanartreytir**
Løn og setanartreytir sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og avvarðandi yrkisfelag

**Nærri upplýsingar** um starvið fáast við at venda sær til deildarleiðaran Ænu Reinert tlf 304500 lok 4130 ella teldupost ana.reinert@lsh.fo ella leiðandi sjúkrarøktarfrøðingin á psykiatriska deplinum á Landssjúkrahúsinum, Bergit Weihe, tlf. 304500, lokal 4102 ella teldupost bergitw@lsh.fo

**Umsóknarfreistin** er 27. oktober 2004 kl. 12.00.

**Skrivlig umsókn**, merkt "umsókn til starv" við avriti av prógvum, CV og viðmælum e.l. skal sendast til

**Landssjúkrahúsið**
Starvsfólkadeildin
FO 100 Tórshavn

*Á heimasíðuni hjá Landssjúkrahúsinum www.lsh.fo sæst meira um størv við at klikka á leinkjuna "starvsfólk"*



**Landssjúkrahúsið**
FO 100 Tórshavn

# Sjúkrarøktarfrøðingur til goymsluna

Til goymsluna á Landssjúkrahúsinum er eitt fulltíðar avloysarastarv sum sjúkrarøktarfrøðingar leyst at søkja til setan skjótast gjørligt til og við 31. oktober 2005.

*Starvið var herfyri lýst sum fast starv, men tað verður við hesum rættað til avloysarastarv. Umsóknarfreistin er eisini broytt.*

Goymslan hevur umleið 7.000 ymiskar vørur, og umsitur umleið 13. milliónir kr. árliga. Vit veita vørur til Landssjúkrahúsið, Suðuroyar sjúkrahús, Klaksvíkar sjúkrahús umframt onnur viðskiftarfólk innan heilsuverkið.

Goymslan umsitur eisini útlán av hjálpartólum, sum verða lænt sjúklingum heim styttri tíðarskeið.

Umframt tað vanliga arbeiði á goymsluni kemur viðkomandi at umsita hesi útlán.

Tað starvast í løtuni 6 starvsfólk á goymsluni.

**Førleikakrøv:**
- prógv og góðkenning sum sjúkrarøktarfrøðingur.
- faklig vitan innan tól og vørur, sum dagliga verða nýtt í røktini á sjúkrahúsum
- edv-kunnleiki á brúkarastøði (Navision Financials forrrit verður brúkt)
- kunnleiki til goymslur og vørustýring er ein fyrimunur.

**Eginleikar:**
- góður røkjuskapur
- góð samstarvsevni og tænastasinni
- at verða opin og positiv/ur, eisini tá nógv er at gera.

**Setanartreytir**
Løn og setanartreytir smb. sáttmálan millum Felagið Føroyskir Sjúkrarøktarfrøðingar og Fíggjarmálaráðið.

**Upplýsingar um starvið**
Nærri fæst at vita um starvið við at venda sær til Malenu Meitelberg, leiðara á goymsluni.
Telefon 30 45 99 - 1163 ella
e-post malenam@lsh.fo

Umsóknarfreistin er 27. oktober 2004 kl. 12.00.

**Skrivlig umsókn**, merkt "umsókn til starv" við avriti av prógvum, CV og viðmælum e.l. skal sendast til

**Landssjúkrahúsið**
Starvsfólkadeildin
FO 100 Tórshavn

*Á heimasíðuni hjá Landssjúkrahúsinum www.lsh.fo sæst meira um størv við at klikka á leinkjuna "starvsfólk"*


W W W . S O S I A L U R I N . F O


# ítróttur

Nr. 195 • mikudagur • 13. oktober 2004 • 78. árgangur • www.sosialurin.fo


# John aftur í hitan

**Broytingar mugu gerast á føroyska liðnum, og tað líkist einum plássi til John Petersen, tó at aðrir møguleikar eisini finnast**



*Nýggjur leikari skal finnast á miðvøllinum. Venjararnir hava fleiri møguleikar at velja ímillum, men tað líkist einum plássi til John Petersen*


LANDSLIÐIÐ
*Jákup Mørk/*
*Álvur Haraldsen*


**Dublin, Írland:**
Tað er sjálvandi skaðin hjá Claus Bech Jørgensen, sum ger tað alneyðugt hjá venjarunum at fremja broytingar á liðnum, sum annars hevur staðið seg rættiliga væl teir báðar seinastu dystirnar. Ikki minst tí 4-5-1 uppstillingin hevur riggað somikið væl. Bæði tí miðvøllurin við hesum hevur fingið nakað meira av pondus, og eisini tí tað hevur hepnast somikið væl at hava ein ógvuliga mobilan Rógva Jacobsen sum fimta miðvallaranum.

## Møguleikarnir

Í so máta er kanska ikki mest nærliggjandi at rokna við, at Rógvi verður fluttur av tí plássinum, men tað eru tað so aðrar orsøkir, sum kortini tala fyri. Ikki minst tann sannroynd, at John Petersen upp á eitt lítið korter gjørdi heilt nógv um seg sum avloysari hjá Rógva á Cypern. Ja, helst somikið nógv, at talan var um bestu landsliðsminuttirnar hjá John í hampuliga langa tíð. Hartil kemur so eisini, at Rógvi áður hevur staðið seg væl á vinstra miðvallarborði. Fram til dystin móti Sveis, har Claus Bech Jørgensen kom í hópin, sat Rógvi soleiðis á sessinum .

Soleiðis sum landsliðshópurin er samansettur, so finnast tó eisini fleiri aðrar møguleikar at seta liðið saman eftir. Heðin á Lakjuni hevur leikt framúr fyri HB í ár, og fyri hetta varð hann eisini tikin við í hópin, men enn hevur hann so ikki fingið nakran minutt á ferðini.

Ein annar møguleiki kundi verið, at Atli Danielsen kemur inn, soleiðis sum hann gjørdi tað á Cypros, og at Julian Johnsson síðani tekur plássið úti í vinstru. At døma eftir innskiftingunum, sum hava verið gjørdar seinastu tíðina, so er Atli helst ein av teimum, sum av álvara nærkast einum føstum plássi, men spurningurin er so, hvørt hetta verður mitt á miðvøllinum ella aðra staðni á liðnum.

At Hjalgrím Elttør nú er komin afturat í hópin, letur eisini upp fyri nøkrum møguleikum, men tað er illa hugsandi, at hann kemur beinleiðis inn millum teir fyrstu ellivu. Og endiliga kundi verið, at venjararnir gjørdu av at nýta Súna Olsen eitt vet longur uppi á vøllinum. Tað vil altso siga, at finna nýggjan leikara til vinstra bakk. Her eru sjálvandi eisini nakrir møguleikar, men skal slíkt eksperiment gerast, so fara venjararnir helst at gera tað í einum venjingardysti. Tí broytingar í verjupartinum eru ikki nakað, sum tú bara gert, tá talan er um undankappingardyst móti einum av liðunum, sum berjast fyri at koma við til endaspælið. Tá ræður um at hava eina verju, sum megnar at standa móti trýstinum.

## Liðið

Sæð burtur frá neyðugu broytingunum, skal ikki roknast við, at føroyska liðið verður broytt nakað serligt í mun til tað, sum fór á vøllin móti Cypros.

Málverji verður uttan iva aftur Jákup Mikkelsen, og í verjuni er at kalla sjálvskrivað afturval til allar fýra leikararnar. Einasta undantakið kann so verða, um venjarin roynir at flta Súna Olsen upp at fylla miðvøllin, men tað vildi undir øllum umstøðum verið ein djørv avgerð til júst hendan dystin. Tí verða tað helst Pól Thorsteinsson, Óli Johannesen, Jón Rói Jacobsen og Súni Olsen, sum fara at manna tey fýra verjuplássini.

Miðvøllurin kann so setast saman eftir ymsum mynstrum, men her verður tó roknað við, at teir fimm frá høgru verða Jákup á Borg, Julian Johnsson, John Petersen, Fróði Benjaminsen og Rógvi Jacobsen. Einsamalla álopsplássið verður so aftur upp til Jónhard Frederiksberg at fylla, soleiðis sum hann hevur gjørt tað í seinastu dystunum.

# Rundir dagar í Írlandi

**Fimm leikarar hava rundan dag mikudagin**


JUBILEUM
*Jákup Mørk/*
*Álvur Haraldsen*


**Dublin, Írland:**
Gongst eftir ætlan, so verða tað fleiri av føroysku landsliðsleikarunum, sum fara um hampuliga rund dystartøl mikudagin, tó at talan ikki verður um nakað veruligt jubileum.

Óli Johannesen stendur fyri sínum 70. dysti, og sum hann hevur leikt seinastu dystirnar, so er so eingin sum helst ivi um, at hann eisini verður á vøllinum hesaferð.

Og umframt liðskiparan, so eru ikki færri enn fýra aðrar leikarar, sum fara um runt tal mikudagin, um ikki óvæntaðar broytingar verða framdar á liðnum. Julian Johnsson er helst leikarin, sum innan leingi liggur næstovastur á alltime listanum hjá Føroyum yvir altjóð dystir. Dysturin hjá honum á Cypros var tann 59. í røðini, og soleiðis sleppur hann helst í lítla bólkin, sum hevur rundað tey seksti fyri Føroyar.

Bæði Fróði Benjaminsen og Rógvi Jacobsen hava møguleikan at spæla sín landsdyst nummar 30, og endaliga kann Jón Rói Jacobsen spæla sín dyst nummar 20, síðani hann fyri trimum árum síðani debuteraði á Svangaskarði sum innskiftur álopsleikari.



*Talan verður nærum um føðingardagshýr, tá farið verður á vøllin mikudagin*